## Flogbóltskapping í Trongisvági

Leygardagin verður Føroya Banka -kappingin fyri yngru deildir hildin í Trongisvági. Byrjað verður longu klokkan 9, tá dreingir og gentur 10 og 12 byrja sínar dystir, og síðani gongur slag í slag. Klokkan 12 spæla gentur 14, mansunglingar og kvinnuunglingar, og klokkan 16 eru tað so dreingir 14, sum standa fyri tørni.



## B36 best á hálvum vølli

Kappingin fyri smádreingir á hálvum vølli er nú av, og her gjørdist B36 føroyameistari. Teir vunnu finaluumfarið framman fyri 07 Vestur, HB og Royn. Á myndini síggjast fegnu dreingirnir saman við Milan Kuljic, sum er venjari hjá teimum.

# Avgerandi á Argjum

**Dysturin millum AB og KÍ verður avgerandi fyri, hvat av liðunum verður føroyameistari. KÍ hevur undan dystinum tvey stig meira enn AB og nógv betri málúrtøku, so KÍ kann í veruleikanum gerast meistari við javnleiki, meðan kravið til AB er ein sigur**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Ársins stóra brak í føroyskum kvinnufótbólti verður sunnudagin klokkan 13 inni í Vika á Argjum, tá AB tekur ímóti KÍ. Hetta eru tey bæði liðini, sum alt árið hava kappast um at vera best, og higartil er 1-0 til AB, sum vann steypakappingina, men nú er tað føroyameistaraheitið, tað snýr seg um.

Undan dystinum, sum er tann næstsíðsti hetta kappingarárið, er eingin ivi um, at KÍ stendur við sterkaru kortunum á hondini. Fyri tað fyrsta er KÍ tvey stig framman fyri AB á stigatalvuni, og haraftrat hevur KÍ eina málúrtøku, sum er heili 40 mál betri enn tann hjá AB!

Sostatt er í veruleikanum nóg mikið hjá KÍ at fáa javnleik burtur úr dystinum, fyri at fáa tíggjunda meistaraheitið á rað til høldar, sum forrestin ikki er so lítið av einum bragdi, um tað hendir. Við føroyameistaraheitunum, sum gentur 14-17 og smágentur hjá KÍ hava vunnið í ár, sær eisini út til, at enn fleiri kunnu vera á veg í bestu kvinnudeildini.

Hinvegin er líka so vist, at um AB vinnur dystin sunnudagin, verða argjakvinnur meistarar, tí so fara tær eitt stig fram um KÍ. Og eingin sær fyri sær, at botnliðið B68/NSÍ tá í allarseinasta umfarinum skal taka stig frá AB á Argjum, samstundis sum KÍ á heimavølli spælir ímóti Skála.

### AB á veg fram

Men hóast KÍ hevur betru kortini á hondini, hava uppgerðirnar millum AB og KÍ higartil í ár víst, at munurin er so at siga eingin á liðunum, tá avtornar, tí í landskappingini hava liðini vunnið hvør sína ferð 1-0, umframt at tey eina ferð hava spælt 1-1. Og tá AB fyrst í juli mánaði basti KÍ í steypafinaluni, var tað eisini við einum teprum sigri, 2-1.

Sostatt er lagt upp til eitt brak av einum avgerandi oddadysti á Argjum sunnudagin, har alt kann henda. Samstundis er tað áhugavert, at AB skal vera komið burtur úr mestsum ongum til at gerast eitt oddalið, ið bjóðar fleirfaldu meistarunum av. Tað er bara hent hendinga ferð hesi síðstu níggju árini, at nakar hevur gjørt tað.

Tó kann hómast ein miðvís menning í gentu- og kvinnufótbóltinum á Argjum, tí í fjør vann AB silvur, hóast heili 13 stig aftan fyri KÍ. Kanska spírin var lagdur í 2004, tá AB vann bæði smágentudeildina og gentur 10-12, umframt at liðið í 2006 vann gentudeildina og annars gjørdist triðfremst í kvinnudeildini. Og í øllum førum hevur framgongdin hjá AB givið kvinnufótbóltinum eina nýggja dimensjón, men so fæst at síggja, um tað er nóg mikið til at hótta sigursvanda KÍ-liðið.

Dysturin verður helst spældur við nógvum áskoðarum, tí argjafólk ganga høgt upp í tað, umframt at norðoyingar í stórum tali allíkavæl eru á veg til mansdystin í Gundadali aftaná. Eisini verður dysturin sendur beinleiðis á Rás 2.

### Hinir dystirnir

Hinir báðir dystirnir sunnudagin mugu sigast at hava væl minni týdning, tí teir eru í øðrum førinum millum tey bæði liðini í miðjuni og í hinum førinum millum tey bæði niðastu liðini.

Í Gøtu tekur Víkingur ímóti Skála, og undan dystinum hava liðini ávikavist 31 og 22 stig, so tey hava langt síðani funnið sítt endaliga pláss á stigatalvuni. Hin dysturin er á Toftum millum B68/NSÍ og EB/Streym, sum hava ávikavist sjey og fýra stig, so her fellur helst avgerðin um, hvør endar niðast og næstniðast.

Allir tríggir dystirnir í 1. deild hjá kvinnum sunnudagin verða spældir samstundis, klokkan 13.



**Í undanfarnu dystunum millum AB og KÍ í ár hevur ongantíð verið meiri enn eitt mál á muni, so væntast kann ein jøvn og spennandi uppgerð um føroyameistaraheitið hjá kvinnunum sunnudagin**
Mynd: Álvur Haraldsen

# Vilja halda KÍ uppi

**Fyri feløgini í Eysturoynni er tað hálvgum ein vanlukka, um KÍ flytur niður, og tí vilja tey í Víkingi leggja nógv fyri, tá B36 kemur á vitjan**



jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Tað er vanliga so, tá KÍ spælir í Gøtu, at hundraðtals klaksvíkingar taka ferðina undir Leirvíksfjørð. Í kontrasti standa vitjanirnar hjá havnarfeløgunum, har talan vanliga er um einar 30-50 áskoðarar.

Tí er ein fíggjarligur smeitur av format fyri eysturoyarfeløgini, um KÍ noyðist eina deild niður at spæla, og tað tykist veruliga hava tendrað spælararnar hjá Víkingi, sum taka ímóti einum B36-liði, sum veruliga hevur funnið stevið seinastu dystirnar.

Hjá B36 er setningurin hinvegin rættiliga einfaldur. Hvørt stig, sum verður vunnið afturat í teimum báðum seinastu dystunum, er eitt stórt stig móti bjargingini. Og tað verður júst hetta, sum tað verður farið eftir sunnudagin.

Men hjá teimum verður tað tó uttan Poul Arna Jacobsen, sum fekk sítt fimta gula kort, tá B36 vann á NSÍ sunnudagin.



**Í Gøtu siga tey, at tað gevur munandi meira í kassan, tá KÍ vitjar heldur enn B36, sum ikki hevur í nær námind so nógvar áskoðarar við sær til útidystir í Eysturoynni**